# ÁTTA BÓLKAR VERÐA VIÐ Í SEMIFINALUNI Í ÍTRÓTTARHØL

## 1. LAMA SEA



**Janus Rasmussen**
- sang og gittar
**Jón Klæmint Hofgaard**
- gittar og sang
**Sakaris Emil Joensen**
- bass og sang
**Tróndur Herason**
- trompet
**William Souvy Olsen**
- trummur

**»Longu áðrenn teir byrjaðu at spæla, sást týðiliga, at hesir ungu garpar vóru livandi og fullir av spæligleði. Lama Sea vóru komnir fyri at undirhalda og áhoyrararnir fingu undirhald fyri allar pengarnar. Teir spældu ikki fyri sær sjálvum, men fyri fólkunum úti í salinum.«**

**- Sosialurin eftir 1. umfar**

Lama Sea er ein bólkur, sum er mannaður við fimm ungum tónleikarum í aldrinum frá 17 til 20 ár. Teir búgva allir í høvuðsstaðnum – Havn og Hoyvík. Teir siga seg spæla eina lívliga blanding av funk-rocki, ið sum fremsta endamál hevur, at fólk skulu dansa og hoppa.

Ljóðið er rættiliga skitið og rátt, tí at teir ikki nýta aðrar effektir enn vanligt distortion og overdrive. Bólkurin hevur spælt saman í umleið trý ár, men hevur fyri stuttum fingið ein trompetspælara, ið kryddar tónleikin við einum nýggjum, serligum ljóði.

Bólkurin hevur áður framført í millum annað Margarinfabrikkini, Vertshúsinum, Mentanarhúsinum í Fuglafirði og Studentaskúlanum í Hoydølum. Harafturat eiga teir tvey løg á fløguni »Ampaljóð« hjá Sprenrex.

Lama Sea var við í 1. umfari og kom víðari saman við GoGo Blues.

## 2. ALL THAT RAIN



**Rókur Jákupsson Jakobsen**
- sang og gittar
**Jens Tummas Næss**
- bass og sang
**Hans Ravnsfjall**
- gittar og sang
**Henning Nicodemussen**
- trummur og sang

**» All that Rain er ikki nýhugsan ella eksperiment, men grundfestur rockur. Og Rókur er nú einaferð Rókur, hann kennist aftur, tí slepst ikki undan, men hann hóskar væl saman við All that Rain, og saman kemur burturúr ein góð blanding av øllum tí góða, sum hesir tónleikarar borga fyri – saman og hvør sær.«**

**- Sosialurin eftir 2. umfar**

Bólkurin All That Rain varð stovnaður í desember mánað í 1999. Allir teir tríggir upprunaligu limirnir í bólkinum, høvdu verið partur av Kjølum frammanundan.

Fyrstu tíðina var tað gittarspælarin Jens Marni Hansen, sum sang í bólkinum, og hann er eisini oddafiskur á tí mesta av útgivnað tónleikinum hjá bólkinum.

Í august mánaði 2001 fór Jens Marni úr bólkinum, og síðani hava tríggir sangarar roynt seg. Fyrst var tað nýggi gittarspælarin Hans Ravnsfjall, sum sang og spældi, síðani kom fyrrverandi sangarin í Týr, Pól Arni Holm, upp í bólkin, og síðstu mánaðirnar hevur Rókur Jakobsen verið sangari í bólkinum. Hann hevur áður roynt seg í eitt nú Tangz og MC Hár.

All That Rain endaði nummar tvey í Prix Føroyum 2001, men teir vóru ikki við fyri tveimum árum síðani.

All That Rain spælir rocktónleik, og nú eru teir farnir at syngja á føroyskum burturav.

Teir vóru við í 2. innleiðandi umfari og komu tá víðari saman við Makrel.

## 3. LAWETZ



**Høgni Reistrup**
- sang
**Ísak Sambleben**
- bass
**Høgni Fagraberg**
- gittar
**Sveinur Dam**
- gittar
**Halgir Arge**
- trummur
**Dávur Juul Magnussen**
- trekkbasun
**Tróndur Olsen Olsen**
- fløtahorn og trompet
**Jenny Old**
- kór

**» Hóast fólk høvdu havt møguleikan at hoyra Lawetz áður, so vóru teir aftur hesaferð frískir og frekir soleiðs mitt í tí heila. Eftir meira vanligan popp og rocktónleik frá trimum bólkum frammanundan blástu teir salin um koll við sínum leikandi lætta tónleiki, og tað var næstan sum at vakna í onkrum sólføgrum suðurlandi, tá ið Lawetz setti sólsellurnar til.«**

**- Sosialurin eftir 3. umfar**

Bólkurin Lawetz er ikki nýggjur í Prix-høpi. Teir vóru við í Prix Føroyum 2003 og komu í hálvfinaluna. Tónleikurin vísti seg tó at vera ov glaður til eitt finalupláss, halda teir sjálvir.

Lawetz hava ikki spælt nógv síðan seinasta Prix. Orsøkin er tann, at trummuspælarin er tónleikalesandi uttanlands, og harafturat hava hinir limirnir í bólkinum havt nógv at gjørt við øðrum projektum – eitt nú »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið« og Páll-FinnurPáll.

Fyri at vera við aftur í ár, var bólkurin noyddur at finna nýggjan trummuspælara. Valið fall á Halgir Arge, sum áður hevur spælt í Tangz.

Tónleikurin, ið Lawetz borðreiddi við í Fuglafirði og nú á Tvøroyri verður poppur, soleiðis sum øll elska hann - og elska at hata hann. Dentur verður lagdur á spæligleði og áhoyrararóm.

Lawetz var við í 3. innleiðandi umfari, og tá komu teir víðari saman við Eyðun Nolsøe.

## 4. MAKREL



**Ári Rouch**
- sang og keyboard
**Rasmus Rasmussen**
- gittar
**Rólant av Reyni**
- gittar
**Magnus Hansen**
- trummur
**Hergeir Staksberg**
- bass

**»Makrel vóru síðstir. Teir høvdu boðað frá stílskifti. Tyngri løg, sum vóru djúp. Og long. Rútmiskt koyrdi tónleikurin framúr. Og teir sluppu sera væl frá framførsluni, sum var góð og uttan hóvasták. Rein.«**

**- Sosialurin eftir 2. umfar**

Rockbólkurin Makrel hevur gingið sínar egnu leiðir síðstu árini. Bólkurin hevur verið serstakur í føroyskum tónleiki, og tær báðar útgávurnar hjá bólkinum hava víst ein bólk, sum hevur funnið sín egna stíl – harður, men melodiøsur rocktónleikur við einum eyðkendum tóna.

Makrel hevur spælt til nógvar konsert herheima, og teir hava eisini verið á ferð uttanlands. Teir hava spælt í Íslandi, og tvær ferðir hava teir verið á palli á spælistaðnum Vega í Keypmannahavn.

Makrel royndi seg til Prix Føroyar fyri tveimum árum síðani, og tá endaðu teir sum nummar trý í kappingini og fingu umvegis kappingina møguleikan at spæla uttanlands.

Aftur í ár ætlar Makrel sær uttanlands at spæla, og okkurt er upp á tal til páskirnar og aftur í summar.

Makrel var við í 2. innleiðandi umfari, og tá komu teir víðari saman við All That Rain.